# Rúsandi rútmur á sandinum

**Sonn rútmuveitsla var á Gøtusandi, tá ið Spleen United framførdu í gjárkvøldi. Við brúsandi tónleiki fekk Spleen United veruligt lív í fjøldina, sum ikki var so stór, sum hon onkuntíð áður hevur verið**

UMMÆLI
*Rókur Jákupsson Jacobsen*
*post@sosialurin.fo*

Klokkan 00.00 skuldi konsertin byrja. Men tað tók ein lítlan hálvan tíma, áðrenn alt tað tøkniliga var uppá pláss, so Spleen United sluppu framat. Tað er ikki frítt, at undirritaði gjørdist eitt sindur argur av bíðitíðini, men tað tók Spleen United einar tríggjar minuttir at reinsa luftina okkara millum. Sum ein væltrimmað rokkmaskina oystu teir lekkrar rútmur oman av pallinum til stóra fragd hjá okkum, sum lýddu á. Hetta var snøgt sagt eitt tipp, topp professionelt show, har hjúklað varð um smálutirnar.

### Fantastiskt ljóð

Eg havi upplivað tey flestu høvuðsnøvnini, sum hava spælt á stóra pallinum á G!-festivalunum gjøgnum árini, men ongantíð áður hevur ljóðað so væl, sum Spleen United gjørdu. Ljóðmaðurin (tíverri veit eg ikki, hvør hann er) hevði serstakliga gott tak á ljóðmyndini. Hon var hørð og bleyt samstundis. Allir smálutir á pallinum vóru klokkuklárir, og hetta hóast ljóðið var hart frá.

Ofta er vandi fyri, at ljóðið leypur saman, tá ið tað skúmar út úr einum so stórum anleggið, men í kvøld var eitt undantak. Heilt einfalt fantastiskt ljóð til konsertina.

Eg skeitti nakrar ferðir eftir ljóðmanninum, og hann var allatíð djúpt involveraður í tónleikinum og skrúvaði allatíð uppá teir mongu knøttarnar. Hann hevur stórt rós uppiborið.

### Live og forritað í senn

Tónleikurin hjá Spleen United varð framførdur av væluppløgdum ungum monnum. Tónleikurin við nógvum forritaðum elementum er av slagnum elektro-rokk. Umframt tey obligatorisku ljómborðini eru gittari og trummur partur av bólkinum, sum gevur eitt gott bland. Tað er serliga forloysandi, tá ið el-gittarin kemur inn í ljóðmyndina og ger tónleikin skitnari og meira rockkendan.

Serliga vóru tað trummuleikarin og sangararnir báðir, sum eg helt skaraðu framúr. Trummuleikarin var serstakliga "tight" og kontantur, og hann gjørdi eisini nógv burturúr tí visuella, soleiðis at hann var spennandi at hyggja eftir. Hóast nógvar rútmur eru programeraðar hjá Spleen United, so var hann kremið á kakuni hjá bólkinum. Hann fylti sera nógv í myndini, og gav tónleikinum eina eyka dimensión. Sangararnir vóru fínir entertainarar. Umframt at syngja væl, vóru teir sera dugnaligur til at heppa og peppa áhoyrararnar. Teir leiddi okkum trygt og væl í gjøgnum alla konsertina.

### Hoppandi áhoyrarar

Spleen United var sum ein risa radiator, sum fjálgaði og hitaði fjøldina í kalda sirminum á sandinum í Gøtu. Náttúran í teirra tónleiki er hoppan og dansur, og áhoyrararnir framman fyri stóra pallin sviku ikki. Hvør einasta tá á Gøtusandi vippaði hendan lítla tíman, sum konsertin vardi. Hóast tónleikurin hjá Spleen United ikki verður so nógv spældur í føroysku loftmiðlunum, sungu áhoyrarar við tónleikinum, og teir hoppaðu frá byrjan til endan.



Spleen United var sum ein risa radiator, sum fjálgaði og hitaði fjøldina í kalda sirminum á sandinum í Gøtu



SIC er uttan iva betri spælandi enn nakrantíð áður

# Lívligur larmur við Sic

**Umstøðurnar fyri eini góðari deyðsmálms konsert vóru ikki góðar, tá SIC spældi á Gøtusandi. Kuldi, sirm, vantandi áskoðarar og vánaligt ljóðbland settu sín dám á konsertina. Fyri flestu bólkar hevði hetta fullkomiliga oyðilagt framførsluna, men onkursvegna megnaði SIC kortini at skapa lívliga konsert**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*post@sosialurin.fo*

SIC er uttan iva betri spælandi enn nakrantíð áður. Eftir eina langa konsertferð uttanlands, hava fleiri konsertir her heima seinastu vikurnar vitnað um, at hetta er ein vælspælandi bólkur.

Men á konsertini á stóra pallinum á Gøtusandi, var hetta ringt at hoyra, tí í stóran part av framførsluni leyp ljóðið saman í eina suppu, ið bar boð um, at ljóðblandarin hevði gloypt ein ov stóran bita. Hetta er ein serlig tónleikagrein og um tú ikki kennir hana, eigur tú ikki at ljóðblanda hana.

### Styrkin er góðu løgini

Styrkin í tónleikinum hjá SIC, er umframt nógvu orkuna, tey góðu løgini. Løg sum innan eina sera larmandi tónleikagrein, eru fjølbroytt uttan at missa fokus. Løg sum "My Hell" og "Done Pretending", ið á fløguni hjá SIC rúma nógvum ymiskum, ljóðaðu á konsertini sum tvey onnur petti av monotonum larmi. Einans semi-hititð "Dare to Risk to Regret" breyt nakað frá við sínum Biohazard-kenda líki.

Konsertin boðaði annars frá góðum við fleiri sera góðum løgum, ið undirritaði ikki kendi frammanundan. Eitt nú var eitt sera harligt lag, ið teir kallaðu "Cold and Black", ið eg gleði meg at hoyra í betri ljóðblandi.

### Ófatilig orka

Men bólkurin fekk tað av fólki, ið var komið saman á sandinum við sær, og tann ófatiliga orkan, sum bólkurin hevur, megnaði at gera konsertina til eina energiska uppliving, har tað, sum tú føldi av tónleikinum, vigaði upp fyri tað, sum tú ikki veruliga hoyrdi.

Tað má sigast, at SIC bardist dyggiliga og hóast konsertin av ytru umstøðunum ikki gjørdist so góð sum hon kundi verið, var tað ikki teirra skuld.